

www.oljan.fo

**Jan Müller** 19 - 12 - 2012

# Nýtt oljufelag til Føroya - Stórt frambrot fyri oljuleiting

Útlendskt oljufelag sær møguleikar í økinum, har Marjunbrunnurin varð boraður fyri umleið tíggju árum síðani og hevur søkt um loyvi at leita og framleiða kolvetni. Sera positivt Tað er sera positivt, at nýggj útlendsk oljufeløg vísa føroyska landgrunninum áhuga, sigur Johan Dahl, oljumálaráðharri eftir at tað er vorðið alment, at eitt útlendskt oljufelag hevur søkt um loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetninum á føroyska landgrunninum. Økið, sum talan er um, er í tí gamla Gullhorninum, út móti markinum, har m.a. Amerada Hess boraði tann víðagitna Marjunbrunnin, sum var eitt oljufund, men har mett var við tátíðar tøkni og vitan, at talan ikki var um eitt lønandi fund. Síðani tá hevur ein amerikonsk ráðgevarafyritøka gjørt nýggjar analysur av fundinum og er komin eftir, at umstøðurnar í undirgrundini eru kanska øðrvísi og betri skikkaðar til at kunna goyma lønandi nøgdir av olju enn hildið fyri meira enn 10 árum síðani. Johan Dahl heldur tað vera sera áhugavert, at oljufeløg nú aftur hava áhuga fyri økjum, har borað er áður og økjum nær við. Landsstýrismaðurin heldur tað eisini vera sera lovandi, at onnur oljufeløg enn tey, sum eru her í løtuni, vísa Føroyum ans sum framtíðar oljulandslut. Hetta er við til at geva føroyskari oljuleiting eitt veruligt skump frameftir. Hann fegnast eisini um, at politiska skipanin nakað herfyri tók stig til at seta í verk nýggja lóggávu um Open Door skipan, sum ger tað lættari hjá oljufeløgum at koma inn á føroyskt øki at leita eftir kolvetnum og hjá føroyskum myndugleikunum at lata dyrnar upp fyri nýggjum feløgum. Mannagongdin nú er tann, at økini, sum eitt enn ókent oljufelag hevur søkt um, fyrst skulu lýsast leys at søkja. Hevur eingin søkt innan 90 dagar kann verandi umsøkjari fara í gongd. Jarðfeingi skrivar á heimasíðu sínari m.a. - Umsókn móttikin at fáa loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum Vísandi til §7, stk. 3 í lóg nr. 31 frá 16. mars 1998 við seinni broytingum um

kolvetnisvirksemi verður við hesum boðað alment frá, at umsókn er móttikin um at fáa loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum. ?Økið, ið søkt er um, er innanfyri hesi hornakrosstøl - ?05°1200 W 60°1949 N?05°0000 W 60°3000 N?05°0000 W 60°4000 N?04°5634 W 60°2108 N?04°4410 W 60°2407 N?05°1200 W 60°3000 N?04°2652 W 60°4000 N ? Onnur kunnu eisini søkja um loyvi til sama øki ella partar av hesum. Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 20. mars 2013.